## Rentuhækking hjá Eik

Eik hækkaði í dag renturnar á flestu konti við 0,35 prosentstigum. Talan er um eina rentuhækking, sum kemur í kjalarvørrinum av, at Tjóðbankin í tveimum umførum hevur hækkað tær leiðandi renturnar við tilsamans 0,35 prosentum p.a. Rentan á flestu inn- og útlánum verður hækkað við 0,35 prosentum p.a. Innlán uttan uppsøgn verða óbroytt, meðan eftirlønaruppsparingar hækka við 0,6 prosentum p.a.



## Eingin á varðhaldi

Sjófrágreðingin í gjár staðfesti, at eingin var á varðhaldi á brúnni, tá Heykur og Falkur stoyttu saman næst seinasta leygardag. Sambært Útvarpinum, so staðfesti stýrimaðurin á Heyki, at talan helst var um óansni, og at eingin – umframt stýrimaðurin sjálvur – var á brúnni, tá óhappið hendi. Skiparin á Falki greiddi frá, at tað ikki er vanligt at hava fólk á varðhaldi, tá hálað verður. Bæði skipari og stýrimaður hava greitt frá, at breidilketan á trolinum var farin, og tað kann hava gjørt sítt til, at skipini hava nærkast skjótari enn vanligt, stendur at lesa á uf.fo.

# Lagnan hjá sjúklingum løgd í hendurnar á Løgtinginum

**Nú verða tað løgtingslimirnir, sum skulu gera av, um nógvir sjúklingar framvegis skulu fáa neyðugan heilivág restina av árinum og um aðrir sjúklingar kunnu verða lagdir undir skurð, ella um teir mugu bíða til næsta ár**

HEILSUVERKIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nú er lagnan hjá sjúklingunum á teimum trimum sjúkrahúsunum ikki longur í mínum hondum, sigur Hans Pauli Strøm*

Skulu tey trý sjúkrahúsini sleppa undan álvarsligum sparingum, sum fara at raka sjúklingarnar meint, hava tey brúk fyri 30 milliónum krónum afturat í ár.

Og nú verður tað Løgtingið, sum sleppur at gera av, um sjúkrahúsini fáa peningin ella ikki.

Men vøllurin er eisini kritaður upp, skuldi tað hent, at tey ikki fáa peningin.

Sjúkrahúsini hava latið landsstýrismanninum í almanna-og heilsumálum eina ætlan, har tey hava sett tær sparingar upp, sum tey halda at tað ber til at fremja restina av árinum.

Í høvuðsheitum er talan um at strika útreiðslurnar til tann dýra, men avbera góða heilivágin, sum sjúklingar við gikt, sclerosu, krabbameini, og øðrum álvarsamum sjúkum, fáa.

Í øðrum lagi er talan um atavlýsa allar skurðviðgerðir, uttan tær, sum eru bráðneyðugar.

Men hóast øll hesi álvarsligu inntrivini, verður undir øllum umstøðum neyðugt at lata heilsuverkinum eina eykajáttan upp á slakar 20 milliónir.

### Fingið grønt ljós

Men Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, góðtekur heldur ikki, at útreiðslurnar til heilivág verða skerdar og skurðviðgerðir útsettar.

- Tað er væl ongin sum helst ivi um, at sjúklingar skulu hava heilivág og viðgerð og skerjir heilsuverkið hesar útreiðslurnar, koma tær bara upp á játtanina til serviðgerð uttanlands og aðrar játtanir, sigur hann.

Tí hevur hann nú kunnað samgonguna um sína niðurstøður. Tað hendi á fundi mánadagin og samstundis hevur hann eisini boðað frá, at hann ætlar at søkja um eina eykajáttan upp á góðar 30 milliónir krónur til heilsuverkið, so at virksemið kann halda fram at kalla óbroytt restina av árinum.

Hann hevur eisini kunnað samgonguna um, hvørjar avleiðingar tað fer at fáa, verður peningurin ikki játtaður.

- Eg eri ógvuliga fegin um, at politiski viljin hjá almanna- og heilsumálaráðnum nú er skorin út í papp og hann er, at ongin skal missa sín heilivág og at ongar skurðviðgerðir skulu avlýsast, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann sigur eisini, at samgongan hevur givið honum grønt ljós fyri at søkja um eykajáttan og tað hevur hann gjørt.

### Ikki í hansara hondum

Sostatt hevur hann spælt bóltin víðari yvir til Landsstýrismannin í fíggjarmálum og til Føroya Løgting.

- Hvørja lagnu umsóknin um eykajáttan fær, liggur nú púrasta í hondunum á Løgtinginum.

Málið skal nú ganga sína gongd og verður lagt fyri Løgtingið beint eftir Ólavsøku.

Sostatt hevur Hans Pauli Strøm onga váttan fingið frá samgonguni fyri, at umbønin um eykajáttan, vinnur frama.

- Endamálið við fundinum í samgonguni var ikki at tryggja undirtøku í samgonguni fyri umbønini um eykajáttan.

- Eg havi gjørt mína støðu greiða, men nú er málið ikki í mínum hondum longur, sigur Hans Pauli Strøm.

Hinvegin metir hann, at fundurin í samgonguni var positivur, so hann er avgjørt bjartskygdur.

Hinvegin merkir hetta ikki, at sjúkrahúsini sleppa heilt undan at spara, tí Suðuroyar Sjúkrahús skal spara 300.000 krónur, Klaksvíkar Sjúkrahús skal spara 400.000 krónur og Landssjúkrahúsið skal spara tvær milliónir.

- Hetta er í veruleikanum tað mesta, sum tey trý sjúkrahúsini kunnu spara, uttan at darva virksemið í so stóran um, at tað rakar sjúklingarnar, sigur Hans Pauli Strøm.

Men, hvat hendir, skuldi tað hent, at samgongan og Løgtingið ikki tekur undir við eykajáttanini, vil hann ikki siga.

Men hann hevur áður gjørt púra greitt, at hann góðtekur undir ongum umstøðum, at so ógvusligar sparingar verða settar í verk, sum tað her er talan um, tí tað kann samgongan ikki liva við.

## Handverk í Mentanarhúsinum

**Tey, ið kundu hugsa sær at lært gamla hondverkið tøving, og tey sum hava áhuga í máling, fáa nú aftur høvi at royna seg**

HANDVERK
*tíðindaskriv*

Hetta er triðja árið á rað, at Mentanarhúsið í Fuglafirði verður karmur um skapandi skeiðini, sum tær báðar Unn Eldevig Petersen og Randi M. Gunnarsdóttir, skipa fyri. Skeiðini undanfarin ár hava verið so væl umtókt, at fyrireikararnir nú hava valt, at hava tað í trimum umførum, soleiðis at pláss verður fyri fleiri luttakarum. Fyrsta skeiði var í mai, og tað næsta verður í døgumum 18. – 20. Juli.

Unn Eldevig Petersen sigur, at luttakararnir koma úr øllum Føroyum, og at hetta gjørdi skeiðsumhvørvið enn meira áhugavert. Stemningurin var merktur av arbeiðshugi og kreativiteti, og fólk tyktust at gloyma tíð og stað.

- Summi høvdu langt at koyra til Fuglafjarðar, men tey vóru so upptikin av arbeiðinum, at tey vildu ikki leggja amboðini fyrr enn seint á kvøldi. Men longu tíðliga morgunin eftir vóru tey farin aftur til verka, sigur Unn.

Skeiðið endar við framsýning, har luttakarar kunnu sýna fram tað, sum tey hava latið úr hondum hesar dagarnar. Í góðveðrinum í fjør varð framsýningin flutt út á torgið við Mentanarhúsið, og varð hon sera væl vitjað.